Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Súsanna Bertholdsen, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Skipan við skúlasálarfrøðingum

Spurningar:

1. Hvussu roynist royndarverkætlanin við skúlasálarfrøðingi í skúlanum á Skúlatrøð í Klaksvík?
2. Er nøkur ítøkilig ætlan um at royna hesa royndarverkætlan á øðrum skúlum t.d. í Suðuroynni?

Tað er bert ein fólkaskúli í landinum, sum hevur skúlasálarfrøðing, og tað er á Skúlatrøð í Klaksvík. Hetta er ein 3 ára royndarverkætlan, sum er eitt samstarv millum land og kommunu, og hevur royndarverkætlanin nú tvey ár á baki.

Sambært grein í Skúlablaðnum hevur skúlasálarfrøðingurin á Skálatrøð úr at gera. Nógv børn og ung stríðast við ymiskt sálarfrøðiligt, og fremsta málið við royndarverkætlanini er at veita skjóta hjálp á staðnum til næmingar, sum stríðast við eitthvørt.

Bíðitíðin til Psykiatriska Depilin er drúgv og kanningar vísa, at skjót atgongd til ein sálarfrøðing kann vera við til at lofta børnum og ungum soleiðis, at tað verður óneyðugt við einari drúgvari og krevjandi viðgerð á Psykiatriska Deplinum.

Umframt at hava samrøður við næmingar, so arbeiðir skúlasálarfrøðingurin fyribyrgjandi við at varpa ljós á sálarheilsu, og hvat kann bøta um sálarheilsuna.

Í Suðuroynni er eingin sálarfrøðingur yvirhøvur, og tí er tað eyka møtimikið og krevjandi hjá suðuroyingum at fáa hjálp frá einum sálarfrøðingini; eisini børnum og ungum, tí heilir dagar skulu brúkast til hvørja viðtalu.

Royndarverkætlanir í skúlum koma sum oftast í lag, tí leiðslan í skúlunum tekur stig til tað. Við vitananini vit nú hava um týdningin av skjótari og lættari atgongd til sálarfrøðiliga hjálp, mugu vit tí seta okkum spurningin, um tað ikki eigur at vera uppgávan hjá landsmyndugleikunum at seta fleiri skúlasálarfrøðingar - til dømis við støði í royndunum, ið eru gjørdar á Skúlatrøð.

Á Løgtingi, 4. mai 2023

Súsanna Bertholdsen